## Olympisk egning

Dagurin í dag verður roknaður sum tann stóri egningardagurin upp undir fundin hjá altjóða olympisku nevndini, sum verður í Keypmannahavn í morgin. Tí fara umboð fyri býirnar Chicago, Rio de Janeiro, Madrid og Tokyo at fjeppast uppi í limunum í olympisku nevndini í dag fyri at ávirka teirra støðutakan. Millum teirra, sum egna fyri sínum býum, eru Michelle Obama og Oprah Winfrey fyri Chicago, Lula forseti og Pele fyri Rio de Janeiro og tey sponsku kongshjúnini fyri Madrid. Í morgin kemur Barack Obama, forseti, eisini at hjálpa Chicago. Eygleiðarar halda, at tað verður annaðhvørt Chicago ella Rio de Janeiro, sum fær OL í 2016.



# Góður matfiskur kann ikki seljast



*Soleiðis sær bramafiskur út. Hann kann gerast upp í ein metur langur, men liggur vanliga um einar 40-60 sentimetrar*
*Mynd: Røgvi K. Mouritsen*

**Røgvi K. Mouritsen, sum hevur skrivað stórt verk um fiskar og fiskasløg, heldur ikki, at bramafiskur, sum bátar og skip stundum fáa á snellu og í troli, kann sigast at vera nakar nýggjur fiskur undir Føroyum. – Longu í 1977 fingu vit henda fiskin á laksalínu við Jens Chr. Svabo, sigur hann og heldur seg minnast, at teir onkran túrin fingu einar 40 slíkar fiskar**

FISKAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Herfyri høvdu vit samrøðu við Mortan Johannesen, útróðrarmann, sum hevði fingið fleiri sonevndar bramafiskar á snellu vestanfyri. Hann helt tað vera keðiligt, at ikki slepst av við henda fisk í Føroyum.

Sosialurin hevur frætt frá bæði útróðrarmonnum og trolmonnum, at stundum hevur fitt av hesum fiskaslagi verið uppi í veiðini.

Á Fiskamarknaði Føroya sigur Jens Chr. Olsen, stjóri, seg kenna lítið til hetta bramafisk, men hann heldur, at onkur kassi hevur verið á marknaðinum, sum trupult hevur verið at fingið keyparar til.

Í sínum starvi sum sølumaður í Bretlandi í sínari tíð gjørdist hann heldur ikki serliga kunnugur við hetta fiskaslag.

Røgvi K. Mouritsen á Havstovuni, sum bæði kennir og nakrar ferðir hevur etið hetta fiskaslag, heldur seg hava sæð, at bramafiskur verður seldur fyri góðan prís onkustaðni á evropeiska marknaðinum, og hann heldur eisini, at veiða er eftir hesum fiski.

- Men eg hugdi herfyri og dugdi ikki at finna prísleguna hjá bramafiski. Eg man helst hava leitað ov illa, leggur hann aftrat.

Jens Chr. Olsen sigur seg ikki vita um útflytarar, sum hava gjørt royndir við at senda hetta fiskaslag av landinum.

- Men nú kann eg spyrja onnur, sum arbeiða her, og veit eg okkurt tá, skal eg lata tykkum vita, sigur stjórin.

### Pelagiskur fiskur

Røgvi K. Mouritsen sigur, at fyrstu ferð, hann kann minnast seg at hava sæð bramafisk, var í 1977, tá Jens Chr. Svabo royndi við laksalínu.

- Eg meini, teir onkran túr fingu einar 40 fiskar av hesum slagi.

Hann sigur seg um dagarnar hava hoyrt um snellumenn, sum fiskaðu upsa, ið vóru noyddir at rýma, tí so nógvur bramafiskur var uppi í veiðini.

- Hetta er ein pelagiskur upp- og miðsjóvarfiskur, sum oftast fæst uppi í sjónum. Hann gerst upp til ein metur langur, men liggur vanliga um einar 40-60 sentimetrar. Umframt, at snellumenn plaga at fáa fiskin, er hann ikki óvanligur í flótitroli, eitt nú í veiði eftir svartjafti. Hinvegin haldi eg, at hann er minni vanligur í botntroli.

Røgvi sigur seg ikki duga at meta um, hvørt bramafiskur er meira vanligur nú enn áður, men hann heldur ikki, at stór broyting er í so máta.

- Tað er serliga seint um summarið og um heystið, at fiskurin fæst í føroyskum sjógvi. Eg skal ikki siga, at talan ikki kann vera um eina øking – ella minking – upp á eini 10-20%, men eg havi ikki varhugan av, at broytingin í so máta hevur verið hin stóra, leggur hann aftrat.

### Góður matfiskur

Røgvi K. Mouritsen sigur, at hann nakrar ferðir hevur etið bramafisk, men nú er langt síðan seinast.

- Flakið er vakurt á at líta, og hetta er góður matfiskur, sum smakkar serstakliga væl. Minnist eg rætt, er sjálvur fiskurin í bramafiski eitt vet gráligt á liti.

Eftir myndunum, sum Røgvi hevur sent okkum, at døma, kundi flakið kanska verið eitt sindur ljósareytt á liti.

Hann sigur, at umleið fimti til tíggjundi hvør fiskur hevur ein "parasitt" mitt í flakinum.

- Sker tú 10 fiskar til flak, kanst tú rokna við, at ein ella tveir hava henda parasittin, sum líkist eini hvítari blommu, ið líka sum liggur leys í flakinum. Hetta er tað, sum eg havi sæð og fingið staðfest. Tað er tó eingin vansi við hesum, og parasitturin er púrasta vandaleysur. Tú skolar hann burtur og sker holið burtur,



*Sjóprónur er klænur sum stokkur. Fyri fáum árum síðan var nógv til av hesum fiski í føroyskum sjógvi, men nú er hann at kalla burtur*
*Mynd: Røgvi K. Mouritsen*